# Fólkini skulu uppí aftur dagpeninga-skipanina



*Í dag leggur Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, málið um dagpeningaskipanina fyri landsstýrið*

**- Eg eri sinnaður at broyta dagpeningalógina beinanvegin, soleiðis, at tey, ið eru dottin úr skipanini, koma uppí aftur. Tað hevur ongantíð verið ætlanin, at nakar starvsbólkur yvirhøvur skuldi úr skipanini, sigur Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum**

DAGPENGAR
*Turið Kjølbro*

Tá ið viðgerðin av broytingunum í dagpeningalógini var í tinginum seinasta summar, var ongin ivi um, at politiski viljin var at betra um umstøðurnar hjá teimum, sum vóru knýtt at hesi skipan. Um fyrireikingarnar í sambandi við nýggju dagpeningalógina hava verið ov vánaligar, ella um tingfólk hava sovið í tímanum, tá ið teir atkvøddu fyri hesu nýggju lógini ella eru vorðin skeivt kunnað, skulu vit ikki taka dagar ímillum. Men vit kunnu í øllum førum staðfesta, at hugsað hevur ikki verið um avleiðingarnar av broytingunum í lógini.

- Tað hevur ongantíð verið ætlanin, at fólk skuldu detta úr skipanini. Heldur tvørturímóti. Endamálið var at gera eina betri skipan fyri øll. Tað hevur ongantíð ligið í kortunum, at nakar starvsbólkur yvirhøvur skuldi úr skipanini. Arbeiðsbólkurin, sum arbeiddi við lógaruppskotinum, mælti til at varðveita hálvu tryggingina. Orsøkin til, at hálva tryggingin kortini fór út, var, at hildið var, at fólk vórðu umfatað av skipanini kortini, sigur Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum.

Hálva tryggingin, landsstýrismaðurin sipar til, var sambært gomlu dagpeningalógini, ætlað fólki, ið bæði høvdu B-inntøku og A-inntøku. Hví nýggja lógin ásetur eitt inntøkumynstur, sum sigur, at B-inntøkan skal svara til 75 prosent og A-inntøkan 25 prosent av allari inntøkuni, veit landsstýrismaðurin ikki at siga. Í samrøðum í blaðnum mikudagin og hósdagin við listafólk og sjálvstøðug arbeiðspláss hava vit víst á hesi viðurskifti. Listafólkini siga eitt nú, at tey ongan møguleika hava fyri at liva upp til inntøkumynstrið, sum lógin ásetur.

## Lógin broytt

Nú landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum er vorðin kunnaður um, at fólk ótilætlað eru burturvíst úr dagpeningalógini, fer hann at síggja til, at hesi koma uppí aftur.

- Eg eri sinnaður at broyta lógina beinanvegin, soleiðis, at hesi fólk koma í skipanina aftur, sigur Sámal Petur í Grund, sum longu í dag leggur hetta fyri landsstýrið á fundi.

Almanna- og heilsumálastýrið er annars í ferð við at gera broytingar í dagpeningalógini í sambandi við Vanlukkutryggingarlógina, sum fer í tingið skjótt. Í løtuni fer størsti parturin av arbeiðsorkuni í Almanna- og heilsumálastýrinum til at fyrireika lógaruppskot, ið skulu í tingið áðrenn freistin er úti 5. mars. Tískil væntar landsstýrismaðurin ikki, at tær kunngerðir og reglugerðir, sum skulu gerast í sambandi við nýggju dagpeningalógina, verða gjørdar fyrr enn hetta arbeiðið er liðugt.

## Burturvíst

Sum vit hava víst á í blaðnum seinastu dagarnar, hava broytingarnar, sum vóru gjørdar í dagpeningalógini seinasta summar, havt við sær, at nógv fólk eru burturvíst úr Sjálvbodnu Dagpeningaskipanini. Eitt nú listafólk, ið burturav arbeiða við listini, men sum eru noydd at hava annað arbeiði við síðuna av fyri at breyðføða seg og síni, og sjálvstøðug arbeiðspláss, har bert ein inntøkukelda er. Hesi fólk hava í nógv ár verið í Sjálvbodnu Dagpeningaskipanini og hava haðani verið tryggjað eitt útgjald, eru tey vorðin sjúk. Í broyttu dagpeningalógini hava tey eingi rættindi, eru burturvíst haðani og verða víst til forsorgarhjálp um so illa vil til, at tey verða sjúk. Hetta er ógvuliga mannminkandi og ósømiligt halda tey, ikki minst tá ið hugsað verður um, at hetta alt eru fólk, ið eru væl útbúgvin og sum í allar mátar royna og ætla at klára seg sjálvi. Og vit skulu hava í geyma, at Sjálvbodna Dagpeningaskipanin er ein trygging, hesi fólk sjálv hava tikið stig til at gjalda til, og skal ikki samanberast við eina almanna veiting.

Í gjár setti Annita á Fríðriksmørk, tingkvinna, skrivligan fyrispurning til landsstýrismannin í almanna- og heilsumálum, um málið. Tingkvinnan vil hava at vita, hvussu nógv fólk hava fingið boð um, at tey eru koyrd úr dagpeningaskipanini síðani løgtingslógin nr. 74 frá 8. mai 2001 um dagpening vegna sjúku v.m. kom í gildi. Eisini vil hon hava at vita, hvør orsøkin er til, at tey eru koyrd úr skipanini, hvussu hesi fólk, sum eru koyrd úr skipanini, eru tryggjað inntøku, um tey gerast sjúk. Hon vil eisini hava at vita, um landsstýrismaðurin hevur orðað tær reglur og tær kunngerðir, sum í lógini standa at skula koma í gildi, og um ikki, nær hetta verður gjørt.








# Gera Havnina til reiðar at taka ímóti Norrønu og Smyrli

**Tey næstu tvey árini skal Tórshavnar Havn útbyggjast fyri næstan 70 milliónir. Men kommunan vil ikki betala alt og tí skal samráðast við Vinnumálastýrið, Smyril Line og kanska Strandferðsluna við um at betala ein part**



*J. K Petersen er nú farin at dýpa Tòrshavnar Havn, men hon skal eisini styrkjast, umframt at annað skal gerast. Arbeiðið skal gerast í vetur og kostar 7 milliónir. Tey bæðu næstu árini skal Tórshavnar Havn byggjast fyri 60 milliónir afturat*

HAVNAÚTBYGGING
*Áki Bertholdsen*

Tórshavnar Kommuna er nú farin at gera havnalagið klárt til at taka ímóti teirri nýggju Norrønu, sum verður klár til summarsiglingina í 2003.

Tá ið tað arbeiðið er liðugt, verður beinanvegin farið undir at gera klárt til nýggju suðuroyarferjuna, sum verður sett í sigling í 2004.

Tilsamans er hetta útbyggingar, sum kosta næstan 70 milliónir krónur, sigur Jákup Suni Joensen, formaður í nevndini fyri Tórshavnar Havn.

Hann sigur, at arbeiðið hevur skund, tí fyri ein stóran part ber tað bara til at arbeiða um veturin, tá ið Norrøna ikki siglur í summarsigling.

Fyrsta byggistigið er at byggja havnarlagið út so at Norrøna kann leggja at.

Hetta arbeiðið er byrjað og heldur fram til Norrøna fer í summarsigling og verður so tikið uppaftur næsta vetur.

– Tað arbeiðið umfatar í fyrstu syftu at styrkja atløgubrygguna, at stoypa stabbar út úr henni, sum Norrøna skal leggja at, umframt at gera pullartar og at dýpa havnina.

– Tað arbeiðið varð boðið út. Byggifelagið J.K. Petersen hevði lægsta tilboðið upp á sjey milliónir og er farið undir arbeiðið, sigur Jákup Suni Joensen.

Næsta vetur skal so ferjuskrái gerast. Tað er ein skrái, sum kann flytast upp og niður, alt eftir, hvussu skipið liggur og tað ger hann nógv dýrari.

Jákup Suni Joensen sigur, at hetta er eitt arbeiðið, sum er mett at kosta einar 18 milliónir.

Í fyrstu syftu skal Smyril eisini brúka hetta atløguplássið, men í aðru syftu er ætlanin at gera ferjuskráa uttanfyri atløguplássið hjá Norrønu til Smyril. Hetta er eitt arbeiðið, sum er mett at kosta 34 milliónir.

## Útbyggingar á landi

Nevndarformaðurin í Tórshavnar Havn sigur, at umframt hesar útbyggingarnar, er tað eisini neyðugt at gera stórar ábøtur á landi.

– Landgongin á Norrønu er 16 metrar yvir sjónum, so landgongutornið, sum nú er, kann ikki brúkast longur.

Tí skal eitt størri landgongutorn gerast í fleiri hæddum, so at bæði ferðafólk av Norrønu og Smyrli kunnu brúka tað. Hetta er eitt torn, sum er mett at kosta einar 10 milliónir.

At enda skal tað stóra pakkhúsið takast burtur og pakkhúsið hjá Strandferðsluni flytast út, har Eimskip er. Hinvegin skal Eimskip byggja nýtt pakkhús úti á Skansabryggjuni, so at ferðslan frá Eimskip ongantíð kemur út á Eystarubryggju, men bara verður á Skansabryggjuni, meðan Smyril Line og Strandferðslan verða á langsíðuni á Eystarubryggju.

Jákup Suni Joensen sigur, at hesa útbyggingina uppá næstan 70 milliónir, orkar Tórshavnar Havn ikki at bera einsamøll.

– Vit hava eina kvotu upp á 20 milliónir um árið, sum vit kunnu byggja út fyri og tað liggur nógv á láni. Men allar hesar útbyggingarnar til Norrønu og Smyril skulu vera lidnar í 2004, so tað skal strongjast á, fyri at fáa alt liðugt og tað er ein rættiligur trupulleiki.

Tað er eisini hansara áskoðan, at Tórshavnar Havn eigur einans at halda seg til sjálva atløgubryggjuna og sjálvt havnaøkið, men at tað ikki er uppgávan hjá henni at byggja bygningar á Havnalagnum.

– Tí hava vit tikið samráðingar upp við Smyril Line og Strandferðsluna um, hvør skal betala eitt nú landgongutornið og tað kann eisini verða, at Strandferðslan kemur uppí.

Hinvegin hevur Tórshavnar Havn søkt Vinnumálastýrið um at betala tann partin av útbyggingini, sum krevjast til at Smyril kann liggja at.

# Hotel Hafnia verandi í hondunum á Restorff

**– At selja eitt lívsverk er ikki bara sum at siga tað. Onkur følari hevur kortini verið, men tað lá ikki so nógv aftanfyri, sigur Johan Restorff**



*Restorff-menninir hava ongar ætlanir um at sleppa Hotel Hafnia. Søgurnar um, at hotellið var til sølu, eru ov nógv avgjørdar. Vit fingu ein fyrispurning, men tað lá ikki meiri aftanfyri, enn at tað var ein følari, sigur Johan Restorff x.m., saman við bróðrinum, MC. Myndin er tikin á 75 ára hátíðardegnum herfyri*

FERÐAMANNAVINNA
*Áki Bertholdsen*

– Tað arbeiða ikki við at selja Hotel Hafnia.

Tað sigur ein av eigarunum, Johan Restorff.

Annars hava søgur gingið um, at Hotel Hafnia var til sølu. Onkur fjølmiðil vitsti enna at siga einaferð í heyst, at eitt flogfelag var áhugað í at keypa Hotel Hafnia.

Tað skilst á Johan Restorff, at tað er nakað nógv gjørt av at siga, at hotellið er til sølu.

– Tað er rætt, at vit hava fingið ein fyrispurning um hotellið, sigur hann.

Men hann leggur afturat, at hann heldur ikki, at tað lá so nógv aftanfyri hendan fyrispurningin.

– Eg metti hetta meir sum ein følara, enn sum ein veruligan fyrispurning, sigur hann.

Hann sigur eisini, at tað eru avgjørt ongar samráðingar av nøkrum slag um at selja hotellið og áðurnevnda fyrispurning um at keypa hotellið, hava teir ikki hoyrt meiri til aftur.

Hann vil ikki siga, hvaðani fyrispurningurin kom, men tað vóru frá fólki í vinnuni, sigur hann.

## Eitt lívsverk

Johan sigur, at støðan er heldur ikki tann, at teir eru áhugaðir í at selja hotellið sum so.

– Hotel Hafnia er eitt lívsverk og tað er tað ikki bara sum at siga tað at selja. Hann vísir eisini á, at Hotellið liggur sera væl fyri í Havnini og alt samanlagt ger, at talan skal avgjørt vera um tann rætta prísin.

– Vit fara ikki at selja hotellið fyri lítið og lætt bara fyri at sleppa av við tað. Soleiðis liggur landið als ikki, sigur hann.

Tó leggur hann afturat, at alt er til sølu fyri tann rætta prísin, eisini Hotel Hafnia.

Hvat tann rætti prísurin er, vil hann ikki siga.

Men hann viðgongur tó, at tað er rættiliga bundið at hava hotel.

– Eg havi verið á Hotellinum í 40 ár og MC í 30 ár og tað er rættiliga bundið. Men heldur enn at selja hotellið, ætla vit at fáa onkran at standa fyri tí dagliga rakstrinum, so at vit fáa meiri frí og tað arbeiða vit við nú.

Men nær tað verður veit hann ikki, kanska seinni í ár.

Hann leggur eisini dent á, at tann, sum verður settur at standa fyri hotellinum, skal varðveita støðið, sum hotellið er á, og helst lyfta tað enn longri upp.

## Hava umsókn liggjandi

*Fyri nøkrum árum síðani søkti menninir á Hafnia, saman við øðrum, Tórshavnar Býráð um stykkið at byggja nýtt hotel á Johan Restorff.*

– Ta umsóknina hava vit enn ikki fingið svar uppá, men hinvegin er umsóknin ikki tikin aftur, so hon liggur enn í býráðnum.

Hann sigur, at hendir nakað avgerðandi frambrot í føroyska samfelagnum, eitt nú við oljuvinnuni, er gott at vera fyrireikaður. Tað hildu teir tá ið teir søktu, og taðhalda teir enn. Men enn er ongin olja komin, so, hvussu verður við teimum ætlanunum, veit hann ikki.

Kortini er hann bjartskygdur um framtíðina.

– Vit hava nógvar fyrispurningar til í summar. Nógv av teimum, sum aftur hava bílagt pláss í summar, eru fólk og ferðaskrivstovur, sum vit hava samstarvað við í nógv ár, so tað er hugaligt. So tað er við góðum vónum, at vit ganga summarinum ímóti, sigur Johan Restorff.